*Framhald av síðu 19*

felagið Chevron-Texaco við fylgjandi tekstinum: "the era of easy oil is over" og javnan eru greinar í vísindaligum tíðarritum við heitum sum "The end of cheap oil".

Íløgubankin Goldman-Sachs hevur júst hækkað sína meting av botninum fyri framtíðar oljuprísinum úr 45 upp í 60 dollarar fyri tunnununa, meðan IMF sigur, at oljuprísurin fer at vera høgur - ikki einans á stutt sikt, men eisini uppá longri sikt.

Tekin eru sostatt um, at samfelagið má venja seg við ein munandi hægri orkuprís, serliga tá talan er um olju - (hetta væntast tó at hava smittandi ávirkan á aðrar orkukeldur sosum tungolju, gass og kol).

Myndin vísir oljuprísin í tíðarskeiðnum 1946-2005. Svarta linjan (niðara linjan) vísir nominella oljuprísin, meðan reyða linjan (ovara linjan) vísir oljuprísin tá hædd er tikið fyri inflatiónini. Mynd 2.

Mynd 2




Sum sæst, var oljuprísurin í 1979 umleið $38 meðan hann í juli 2005 var $52 fyri tunnuna. Vit kundu tí trúð, at oljuprísurin átti at hava elvt til eina búskapar-afturgongd eins og tað sum oljukreppurnar í 70'unum evldu til. Men tá vit taka hædd fyri inflatiónini var oljuprísurin í 1979 $96,81 í dagsins prísum - tvs. at oljuprísurin í dag einans er helvtina av prísinum í 1979 tá hædd er tikin fyri inflatiónini. Hædd má eisini takast fyri, at búskapar-vøkstur hevur verið, soleiðis at fólk í dag hava betur ráð til at gjalda meiri fyri oljuna enn í 1970'unum og 1980'unum. Harumframt eru nakrar aðrar orkukeldur komnar til í dag, sum gera okkum minni heft at oljuni. Samanumtikið skal oljuprísurin væntandi upp um $100 áðrenn vit kunnu rokna við eins stórari afturgongd sum við oljukreppunum í 1970'unum.

Spurningurin er tó, um oljuprísurin fer at falla aftur ella um hann veruliga fer upp um $100. Her er tað at forsagnirnar frá serfrøðingunum siga okkum, at vit skulu rokna við einum munandi hægri oljuprísi enn í dag - summir siga at vit um nøkur ár fara at tosa um teir góðu gomlu dagarnar tá oljan einans kostaði $100 fyri tunnuna.

Nógvar ymiskar forsagnir eru gjørdar fyri, hvussu ymisku londini fara at merkja vaksandi oljuprísin. Flestu analysurnar taka støði í verandi samfelagsbygnaði og hyggja eftir hvussu einstøku vinnurnar og húsarhaldini verða rakt.

Nógvir serfrøðingar meta tó, at talan er um størstu avbjóðing móti heimsbúskapinum í nýggjari tíð. T.d. sigur oljuserfrøðingurin Dr. Colin Campbell, at talan er um eina størri avbjóðing enn menniskjan nakrantíð áður hevur staðið yvirfyri.

Eingin ivi er um, at flestu vinnurnar í Føroyum verða raktar av høga oljuprísinum - sjálvt um vit sjálvandi mugu vóna, at tað ikki verður eins ringt og ringastu forsagnirnar leggja upp til.

Av tí at talan er um eitt so álvarsligt evnið fyri komandi árini, er neyðugt at hyggja munandi betur eftir forsagnunum hjá serfrøðingunum um framtíðar oljuprísin og at meta um avleiðingarnar fyri føroyska samfelagið av vaksandi oljuprísi.

**Niðurstøða**

Vónandi gevur hetta álitið eina fatan av, at undirritaði ikki metir, at viðgerðin hjá Búskaparráðnum av partinum um búskaparvøkstur í Visjón 2015 hjá Landsstýrinum er nøktandi og í ávísan mun gevur eina ráðgeving sum er beinleiðis skeiv.

Tískil kundi undirritaði ikki taka undir við frágreiðingini.



ÚTSØLAN
hjá Skilling í miðbýnum byrjar
mánadagin 5. sep 2005

Brillustell -50%
Øll barnastell -50%
Frátikin Lindberg titaniumstell 900,- kr.
Brillustell -75%

SKILLING
N. Finsensgøta. 23 • Tel 312225